átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Revsa meg ei

**Sálmi 38 eftir Dávid**

**v1** Ein sálmur av Dávidi; til minnisofrið. **v2** Harri, revsa meg ei í vreiði tíni, aga meg ei í ilsku tíni; **v3** tí ørvar tínar hava meg rakt, tungt liggur hond tín á mær! **v4** Í mínum holdi er einki heilt fyri vreiði tínar sakir; í mínum beinum er einki frískt fyri synda mína sakir; **v5** tí misgerðir mínar ganga mær yvir høvdið, tyngja meg sum ein byrði, eg ei orki at bera; **v6** míni sár tey rotna og dampa vegna dárskapar míns. **v7** Bogin eg eri, heilt samankropnaður, hvønn dag eg í sorgarklæðum gangi; **v8** tí mínar lendar eru av skruvum fullar, í mínum holdi er einki heilt. **v9** Eg avmaktaður eri, heilt sundursorlaður, eg skríggi av míni hjartans stynjan. **v10** Harri, tú kennir alla mína trá, mín stynjan er ikki fjald fyri tær. **v11** Mítt hjarta slær hart, mín kraft er farin, sjálvt ljósið í mínum eygum eg havi mist. **v12** Vinir mínir og frændur halda seg frá míni sótt; mínir næstingar langt burtur standa. **v13** Teir, ið vilja deyða mín, leggja fyri meg snerrur; teir, ið ætla mín undirgang, um ólukku tala; allan dagin teir um ilskuráð hugsa. **v14** Og eg eri sum ein deyvur, ið einki hoyrir, sum ein málleysur, ið ikki letur munnin upp. **v15** Eg eri vorðin eins og maður, ið ikki hoyrir, og hvørs muður ikki gevur svar. **v16** Tí til tín, Harri, stendur mín vón, tú vilt mær andsvar veita, Harri mín, Guð mín; **v17** tí eg sigi: »Lat teir ikki gleðast um meg, ei sær halda at gaman, tá mín fótur snávar!« **v18** Tí eg nærkomin eri til fals, aldri mín sársaki mær gongur úr huga! **v19** Tí mína synd eg sanni, og yvir míni misbrot eg syrgi. **v20** Teir mannsterkir eru, ið uttan orsøk eru fíggindar mínir, teir mangir eru, ið fyri onga søk meg hata, **v21** ið gjalda mær ilt fyri gott, standa mær ímót, aftur fyri at eg stundi á gott. **v22** Far ikki frá mær, Harri, mín Guð, halt teg ikki langt burtur frá mær! **v23** Skunda tær mær til hjálpar, Harri, frelsa mín!

# Serligar dygdir finnast í OM




*Operation Mission arbeiðir bæði á sjógvi og landi, millum annað við gomlu Norrönu sum nú eitur »Logos Hope«. – Eg gleði meg til arbeiðið, sigur nýggi landsleiðarin og hálvi føroyingurin, Andrew Berghamar*

**– Missiónsarbeiði er teamarbeiði. Tí er gott hjá mær at vita, at eg komi at samstarva við eitt team av royndum og engasjeraðum OM'arum, sigur 35 ára gamli Andrew Berghamar**

**Missión:** Fríggjadagin í farnu viku tók hann við sum landsleiðari í Operation Mission í Danmark.

Andrew hevur altíð havt áhuga fyri missiónsarbeiði, og hevur millum annað starvast sum ungdómsleiðari í Kristnastovu í Keypmannahavn.

Saman við øðrum familjum byrjaðu hann og konan Sara eina lokala fríkirkju í Ballerup. Men hetta arbeiðið ber væl til at samantvinna við tað í OM.

- Gjøgnum arbeiðið sum landsleiðari kunnu vit saman-tvinna okkara hjarta fyri ta lokalu fríkirkjuna við eitt størri engasjement og innlit í alheims missión, sigur hann.

### Brenna fyri sakini

Andrew sær fleiri møguleikar í arbeiðinum hjá OM, sum hann metir hevur nakrar serstakar dygdir.

Í fyrsta lagi hevur OM eini visjoner evni at endurnýggja seg og at hugsa missión inn í nýggjar samanhangir.

Í øðrum lagi hevur OM ein breiðan, evangeliskan og tvør-kirkjuligan profil – ein profil sum danska kirkjulívið avgjørt fer at fáa gagn av í framtíðini.

- Og í triðja lagi hevur OM ein hóp av fólki, sum veruliga brenna fyri sakini, sigur Andrew Berghamar.

Hann byrjaði á skrivstovuni 1. juni og koma hann og fráfarandi leiðarin, Bitten Ingerslev at starva saman fram til 1. oktober í ár.

OM, sum í ár hevur 50 ár á baki, arbeiðir í løtuni í fleiri enn 100 londum. Umframt arbeiðið á landi hevur felagsskapurin eisini trý skip, sum nógvir føroyingar hava verið við og eru við.

Eitt av hesum skipum er gamla Norröna sum í løtuni stendur fyri eini stórari umbygging í kroatiska býnum Trogir.

Tá skipið verður sett aftur í sigling hevur tað samstundis fingið navnabroyting til »Logos Hope«.

# Hoyr sálmabókina á Netinum

**Bæði løg og tekstir til ta nýggju donsku sálmabókina liggja nú á serstakari heimasíðu**

**Danmark:** Nú er gjørligt bæði at lesa tekstirnar til teir 758 sálmarnar í »Den Danske Salmebog« og at hoyra fyrsta ørindi av hvørjum sálmi við urguljóði.

Hetta er alt gjørt fyri at gera tað lættari hjá fólki at fáa upplýsingar um yrkjarar og um søguna hjá sálmunum.

- Teir donsku sálmarnir hava stóran týdning fyri ta donsku sangtradisjónina. Teir eru við til at binda okkum saman tvørturum ættarliðini. Men trupulleikin er bert tann, at so fáa kenna teir.

- Tí vilja vit nú geva fólki atgongd at læra tekstirnar og løgini, sigur danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder.

Eftir hansara meting skal tað vera einfalt at fáa atgongd til sálmarnar. Umvegis alnetið er skjótt at fáa fatur á teimum og hoyra, hvussu teir ljóða, til dømis áðrenn ein skal hitta prestin í samband við eina brúðarvígslu ella jarðarferð.

Leitiskipanin er einføld: Um ein bert minnist eina reglu ella eitt ørindi, ber til at finna fram til tann rætta sálmin.

Nýggja heimasíðan eitur www.dendanskesalmebogonline.dk

Nevnast kann, at føroyska sálmabókin eisini finst á netinum – enn bert sum tekstur á www.folkakirkjan.fo

## Fuglfirðingar á ferð til Ísrael

**Vitjan:** Í oktober mánaði fáa fólk í Fuglafjarðar prestagjaldi eitt serstakt høvi at vitja í Ísrael.

Tá verður nevniliga skipað fyri ferð hagar við lokalum ferðaleiðarum – tað er: Frants Jensen í Fuglafirði og sóknarprestinum Una Næs.

Vitjað verður á øllum teimum kendu støðunum í døgunum 9. til 20. oktober, tá ferðin varir.

## Sungu lovsang eitt heilt vikuskifti

**Havn:** Í farna mánaði skipaðu fólk úr samkomuni Filadelfia fyri eini ráðstevnu um lovsang. Ráðstevnan bar heitið »Hearts Ablaze« og fólk eru samd um, at hetta var ein góð stevna.

Donsku undirvísararnir – Katrine Høgenhaug og Hanne Vinsten – vóru sera upptiknar av at vísa á týdningin í leiðslu av lovsangi, lívsstíli, sangskriving og í praktiskum lovsangi.

Tiltakið varð skipað soleiðis, at tveir danskir undirvísarar greiddu frá um lovsang, meðan fólk úr ymiskum samkomum skipaðu fyri lovsangi á stevnuni.

Íalt vóru 50 luttakarar á ráðstevnuni, sum endaði við eini lovsangskonsert.

## Gav 4,5 mió krónur til missiónsfelag

**Noregi:** - Vit taka hetta sum eina álitisváttan til arbeiðið sum vit gera í Noregi og kring allan heimin. Hetta er eisini ein stór uppmuntring, sigur regiónsleiðarin, Arne Sørås í Det Norske Misjonsselskap.

Herfyri fingu tey hesa stóru gávuna, sum telist millum størstu gávurnar til hetta missiónsfelagið.

Kvinnan sum gav peningin helt tað vera betri at geva peningin til hetta endamálið, enn at hann bara varð standandi í bankanum. Hon hevur áður givið 1 mió krónur til eitt av leguhúsunum hjá Misjonsselskapet.

Sosialurin